## Sterk rúsevni í Klaksvík

**Sambært sýslumanninum í Norðoyggjum eru sterk rúsevni at finna millum ungdómar í Klaksvík**

RÚSEVNI
*Theodor E. D. Olsen*

Eftir øllum at døma gerast narkotisk evni alt vanligari í Klaksvík.

Hans Djurhuus, sýslumaður, sigur við Norðlýsið, at hetta merkja teir á Politistøðini í býnum.

– Tað er ikki longu bara rúsdrekka og hash, men tað kemur alt oftari fyri at talan er um sterkari rúsevni.

– Hesi evni eru í dag allastaðir kring landið, og tað er serliga ungdómurin, sum er blandaður upp í slíkt, sigur sýslumaðurin.

## Kári, Páll og Karsten vilja av við tollfríu sigarettirnar

**Smyril Line og Atlantsflog selja sigarettir fyri meira enn 10 milliónir krónur um árið, sigur Fíggjarmálaráðið**

AVGJØLD
*Theodor E. D. Olsen*

Smyril Line og Atlantsflog selja sigarettir fyri meira enn 10 milliónir krónur um árið. Men hvussu nógvar sigarettir av hesum verða fluttar inn til Føroya ber ikki til at siga.

Tað fekk fíggjarnevndin í Løgtinginum at vita frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen, tá nevndin viðgjørdi uppskotið hjá Kára P. Højgaard um at taka av tollfría innflutningin av sigarettum, tað vil siga sigarettirnar, sum ferðafólk hava loyvi til at hava við sær í land, veit Útvarpið at siga.

Meirilutin í fíggjarnevndini, umboðini hjá samgonguni, mælir frá at samtykkja uppskotið. Nevndarlimirnir hjá Tjóðveldisflokkinum, Páll á Reynatúgvu og Karsten Hansen, taka undir við Kára P. Højgaard.

# Eivør framúr ummæli í Danmark

**Eivør skal allan februar vera á konsertferð í Danmark, har hon longu er væl fagnað**

TÓNLEIKUR
*Theodor E. D. Olsen*



Hósdagin byrjaði Eivør Pálsdóttir konsertferð í Danmark, sum skal vara allan hendan mánaðin. Á ferðini fer Eivør at spæla 11 solokonsertir ymsastaðni í Danmark.

Eivør fer á konserturnum fyri tað mesta at spæla egin løg, tó so at onkrir av cover-favorittunum so sum Summertimer og Send me the Pillow munnu fara at sníkja seg inn í millum.

Hósdagin sang hon á Foderstoffen í Rudme á Miðfjóni, og ummælarin á heimasíðuni hjá spælistaðnum himprast ikki við at lata rósurnar regna oman yvir Eivør.

Ummælið er soljóðandi:
"Eivør – en stjerne er født
Anmeldelse af Ole Larsen

Der var så stille, så stille. Selv den berømte knappenål ville have larmet.

170 mennesker turde næsten ikke røre sig. De havde netop hørt den måske mest banale slutning på en koncert: Gasolins 'Om lidt'. Men for Eivør er intet banalt eller ligegyldigt.

Den blot 22-årig Eivør Palsdottir henrykkede torsdag aften en udsolgt Foderstoffen med en urkraft, der må være hentet direkte fra fjeldene på hendes fødested: Færøerne. Alene på scenen – blot med guitar og en samisk tromme – fascinerede hun publikum fra første sekund med en stemmepragt, en fortolkningsevne og en intensitet som er ganske usædvanlig for så ung en kunstner.

Det var Eivørs første solokoncert på en kort Danmarksturne. Hun er for længst en stjerne på Færøerne og Island. USA, Canada, Sverige og andre europæiske lande har allerede opdaget hende.

Koncerten i Foderstoffen fortalte tydeligt hvorfor: Med den største selvfølgelighed serverede hun færøsk folkemusik, country, gospel, swingklassikere og pop. Læg dertil at hun denne aften mestrede at synge på færøsk, svensk, engelsk og dansk.

– Om lidt blir' her stille, sang Eivør i sin modige fortolkning af en Gasolin-klassiker.

Men et begejstret publikum i Foderstoffen var ikke stille i lang tid. De havde netop set og hørt en lysende stjerne".

Ummælarin tykist at vera so bergtikin av ungu gøtugentuni, at hann í ovfarakæti hevur gloymt, at sangurin "Om lidt" er av plátuni "Forklædt som voksen" hjá Kim Larsen frá november í 1986, tá Eivør var trý ár, og er sostatt skrivaður væl seinni enn á heysti 1978, tá Gasolin', har Kim Larsen var sangari, fóru hvør til sítt.

Konsertkalendarin hjá Eivør í Danmark sær annars soleiðis út, tá konsertirnar, ið hava verið, eru tiknar við:

9. Februar 2006
Foderstoffen, Rudme kl 20
10. Februar 2006
Gjethuset, Frederiksværk kl 20
11. Februar 2006
Bornholms Musikhus kl 21
13. Februar 2006
Copenhagen Jazzhouse kl 20.30
14. Februar 2006
Copenhagen Jazzhouse kl 20.30
16. Februar 2006
Dalbyneder Kirke kl 19
17. Februar 2006 Skraaen, Ålborg kl 20
18. Februar 2006 Train, Århus kl 20
24. Februar 2006 Hagge´s Music Pub kl 21
23. Februar 2006 Gimle, Roskilde kl 20
25. Februar 2006 Stars, Vordingborg kl 20

# Løgreglan úr at gera um vikuskiftið

**Ikki kann sigast, at løgreglan kring landið hevur sitið hendur í favn hetta vikuskiftið, sum hevur merkt av nógvari hálku og tilburðum, har fólk hava verið í hornatøkum. So nógv var at gera, at neyðugt varð at senda boð eftir eykafólki, og tveir politistar afturat komu til arbeiðis í Havn**

LØGREGLA
*Theodor E. D. Olsen*



*Eitt ferðsluóhapp hendi á Velbastaðvegnum í Havn. Fólk vóru koyrd á skaðastovuna og bilførarin var innlagdur*

Leygarmorgunin um fýratíðina rendu tveir bilar í Klaksvík frontalt á hvønn annan, og sjúkrabilur kom á staðið.

Eisini í R.C. Effersøesgøtu í Havn bóru tveir bilar við hvønn annan um næstan sama mundið.

Sunnunáttina stutt eftir midnátt hendi eitt ferðsluóhapp í Leirvík, har ein bilur fór oman av vegnum og endaði næstan á sjónum. Sjúkrabilur kom á staðið, og tað gjørdi sløkkilið eisini, ið surraði bilin, so hann ikki gleið á sjógv.

### Trygdarbeltið bjargaði

20 minuttir seinni hendi eitt óhapp Millum Fjarða, har ein bilur mátti víkja fyri hálkuni. Bilførarin varð koyrdur á Landssjúkrahúsið.

Um 4-5 tíðina endaði ein bilur á Lambareiði á takinum. Hálka fjaldi vegin og var helst orsøkin til óhappið. Bilførarin fekk tó ongan skaða, tí hann sat í trygdarbelti, sigur løgreglan.

Somuleiðis hendu ferðsluóhapp við Norðskálatunnilin, við brúnna við Streymin og á Velbastaðvegnum í Havn. Í tí síðstnevnda førinum vórðu fólk koyrd á skaðastovuna, og bilførarin innlagdur.

### Politiið ofta boðsent

Leygarmorgunin varð politiið boðsent tvær ferðir, av tí at fólk vóru farin til hendurs.

Í Kaldbak varnaðust tey leygardagin, at innbrot hevði verið í skúlanum. Nógv bendir á, at ungfólk hava gjørt hetta, sigur politiið.

Sunnunáttina varð løgreglan í Havn boðsend tríggjar ferðir í sambandi við húsaófrið. Ein 18 ára gamal unglingi, ið hevði dekan ov nógv innanborða og ikki varð mettur at klára seg sjálvan, varð eftir metingum frá lækna innlagdur á Landssjúkrahúsið, til hann varð mettur at vera nóg byrgur at standa á egnum beinum aftur.

Millum klokkan hálvgum 4 og hálvgum 5 noyddist politiið at koma 4 ferðir á staðið við økið kring Auto í Niels Finsensgøtu í Havn, har fólk høvdu lyndi til at brúka hendurnar eitt sindur meira, enn gott var.